# Nevndarsessurin ávirkar ikki tíðindaflutningin

**Stjórin í Útvarpi Føroya og nevndarlimurin í Føroya Banka, Jógvan Jespersen, vísir aftur, at nøkur tvístøða hevur stungið seg upp millum ÚF og Føroya Banka. - Hevði eg roynt at ávirka tíðindaflutningin hjá ÚF við mínum nevndarsessi, so hevði eg hvørki verið egnaður sum stjóri í ÚF ella nevndarlimur í Føroya Banka, sigur hann**



STJÓRASESSURIN Í ÚF
*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*

Jógvan Jespersen vísir ákærunum aftur um, at hann við stjórasessinum í Útvarpinum og nevndarsessinum í Føroya Banka, skaðar trúðvirðið hjá Útvarp Føroya

-Tað hevur leingi verið alment kent, at eg havi verið nevndarlimur í Føroya Banka. Eg kann kortini staðiliga vísa aftur, at tað nakrantíð hevur verið nakar trupulleiki fyri óhefta tíðindaflutningin hjá ÚF. Hevði eg roynt at ávirka tíðindaflutningin við mínum nevndarsessi, hevði eg hvørki verið egnaður sum stjóri í ÚF ella nevndarlimur í Føroya Banka, sigur Jógvan Jespersen.

*Er tað kortini ikki nóg mikið, at fólk hugsa , at tú hevur tveir leiklutir?*

Eg skilji væl, at onkur heldur, at hasi størvini ikki hóska saman. Eg kann kortini bara staðfesta, at tað ongantíð er komið upp á tal, at eg havi roynt at ávirka tíðindaflutningin, sigur ein avgjørdur Jógvan Jespersen.

### 10 ár

Jógvan Jespersen tók við nevndarsessinum í Føroya Banka í 1994. Hann er valdur sum umboð fyri tað almenna, og umboðar ikki partaeigararnar í Føroya Banka.

Stjórin í ÚF sigur, at hann hevur fleiri ferðir havt ætlanir um at siga nevndarsessin frá sær, men nú bíðar hann bert eftir, at hansara nevndarsessur fellur burtur.

- Tað er danska vinnumálaráðið, sum eftir tilmæli frá landsstýrinum hevur sett meg. Danska stjórnin hevur avtikið øll almenn umboð í nevndum, men lógarbroyting er ikki komin í gildið í Føroyum. Hesum bíði eg nú eftir, sigur Jógvan Jespersen.

### Duld hjástørv

Hann vísir á, at hansara nevndarsessur í Føroya Banka hevur altíð verið almennur.

*Hevði eg roynt at ávirka tíðindaflutningin við mínum nevndarsessi, hevði eg hvørki verið egnaður sum stjóri í ÚF ella nevndarlimur í Føroya Banka, sigur Jógvan Jespersen.*

-Ein stórur trupulleiki hjá fjølmiðlafólki í dag er, at tey hava duld hjástørv. Umframt at arbeiða fyri fjølmiðlarnar, arbeiða tey eisini fyri aðrar arbeiðsgevarar, og hetta er ein stórur trupulleiki. Tá eg arbeiddi sum fjølmiðlamaður, hevði eg ikki onnur størv. Sum fjølmiðlamaður ert tú noyddur at seta markið sjálvur, hvat tú tekst við og ikki, sigur Jógvan Jespersen.

### Uni inhabilur

Í viðtalu við Sosialin í gjár heldur fjølmiðlamaðurin, Uni Arge, at tað er ein trupulleiki, at tíðindaleiðarin á ÚF hevur verið limur í ávísum flokki. Jógvan Jespersen heldur tað er burturvið, at Johan Mortensen skal vrakast sum tíðindaleiðari, tí hann hevur verið limur í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

–Hvør kann verða fjølmiðlamaður um talvan skal vera rein fyri øllum virksemi, spyr Jógvan Jespersen.

Jógvan Jespersen heldur hinvegin, at tað er ein nógv størri trupulleiki, at programleiðarin í ÚF, Jógvan Arge, í fjør arbeiddi hálva tíð sum programleiðari og hálva tíð sum tingmaður.

-Sonur hansara Uni er djubt inhabilur, tá hann skal viðgera ÚF. Tann einasti veruligi trupulleikin við trúvirði og ógegni, var støðan við programleiðaranum Jógvani Arge, sigur Jógvan Jespersen.

Hann greiðir frá, at hevði løgtingsval ikki komið í úrtíð, hevði ÚF sett nýggjan programleiðara fyri Jógvan Arge, ti tað ber snøgt sagt ikki til, at hann starvaðist sum løgtingsmaður og sum programleiðari.

Kortini blivu hesar ætlanir av ongum, tí Jógvan Arge varð ikki afturvaldur og tí helt hann á sum programleiðari í ÚF.

# Mikkjal tók avleiðingarnar

**Stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal, tók seg alt fyri eitt burtur úr øllum nevndarvirksemi, tá hann tók við stjórasessinum í SVF. Hann heldur tað er skeivt, at fólk innan fjølmiðlaheimin hava onnur hjástørv, sum kunnu skaða trúvirðið á tíðindaflutninginum**




FØROYSKIR FJØLMIÐLAR
*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*

Í 2001 tók Mikkjal Helmsdal við stjórasessinum í Sjónvarpi Føroya. Hann var virkin í felagnum, Vita Margarin, men nýggja starvið í SVF hevði við sær, at hann tók seg úr Vita Margarin.

-Tað er prinsipielt skeivt, at leiðslur innan fjølmiðlarnar røkja onnur størv ella nevndarsessir, sum kunnu seta trúvirðið hjá stovninum í vanda, heldur stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal.

Hann greiðir frá, at í SVF eru greiðar ásetingar um hvørji hjástørv leiðslan og starvsfólkini á stovnunum kunna hava.

-Tað er avgerandi, at greiður skylnaður er millum fjølmiðlarnar og onnur áhugamál. Vit hava greiðar ásetingar um, at starvsfólkini ikki eiga at vera í nevndum og hava varðandi størv á øðrum stovnum. Hesin politikkur fær eisini stóran stuðul millum starvsfólkini í sjónvarpinum, greiðir Mikkjal Helmsdal frá.

Hann leggur afturat, at endamálið við hesum politikki er, at starvsfólk í SVF ikki hava ein avgerandi leiklut á stovnum í føroyska samfelagnum, sum SVF dagliga viðgerð, tí tað skaðar trúvirðið hjá Sjónvarpi Føroya.

### Balansu gongd

Eftir Leivur Hansen varð noyddur at lata borgarstjórasessin í Tórshavnar kommunu við ársbyrjan 2001, hevur hann starvast í SVF. Nógv hava sett spurning við um, tað er rætt, at Leivur Hansen-sum er virkin tjóðveldispolitikkari er partur av tíðindaredaktiónini hjá SVF.

*Mikkjal Helmsdal heldur tað er skeivt, at fólk innan fjølmiðlaheimin hava onnur hjástørv, sum kunnu skaða trúvirðið á tíðindaflutninginum*

-Skrivið, har vit gjørdu greitt, at starvsfólk á stovnunum ikki eiga at hava onnur hjástørv, kom í gildið eftir, at Leivur Hansen var komin aftur í starv. Tú kanst tí siga, at vit byrjaðu ikki við sløttum borði. Tað vil kortini altíð verða ein balansugongd, sum redaktiónsleiðslan má taka støðu til, vísir Mikkjal Helmsdal á.

### Tvey farloyvi

Løgtingsmenninir, Høgni Hoydal og John Johannessen eru í løtuni báðir í farloyvi úr SVF. Spurdur um, hvørja støðu SVF hevur, um hesir velja at venda aftur í SVF, svarar Mikkjal Helmsdal, at tað er greitt, at hvørgin teirra alt fyri eitt kann byrja at arbeiða við politikki, men verða noyddir at framleiða annað tilfarð.

*Hvussu rúm tíð sleppur at ganga, áðrenn teir sleppa at framleiða tíðindi aftur?*

Hatta er eisini ein spurningur, sum redaktiónsleiðslan má meta um. Eg kann hugsa mær, at metingin verður gjørd eftir í hvussu stóran mun teirra politiska image hongur við.

Er talan um ein floksformann í 8-10 ár, so verður ógvuliga torført hjá honum at viðgera politikk aftur. Eitt dømið er Øssur Winthereig, sum stillaði upp fyri Verkmannafylgingina. Í tí málinum mettu vit, at hansara image, sum politikkari ikki hekk við longur,og tí fekk hann starvið sum tíðindaleiðari, sigur Mikkjal Helmsdal at enda.



# – Politiska luttøkan ávirkar ikki trúvirðið

**Edvard í Skorðini Joensen metir tað ikki vera ein trupulleika fyri trúvirðið hansara sum formaður í Blaðmannafelagnum, at hann í januar var valevni Javnaðarfloksins. – Eg ráðførdi meg við mínar kollegar í Norðurlondum, og eg meti einki skeivt vera við míni avgerð, vísir Edvard á**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- At eg sum valevni ikki kann røkja mín sess sum fakfelagsformaður á fullgóðan hátt, er einfalt ikki rætt, heldur formaður Blaðmannafelagsins, Edvard í Skorðini Joensen, eftir at tíðindakvinnan Brynhild Thomsen vísti sína ónøgd í gjár*

Tíðindakvinnan Brynhild Thomsen segði í vitðalu í blaðnum í gjár, at hon helt tað vera blóðskeivt av formanni Blaðmannafelagsins, Edvard í Skorðini Joensen, at vera valevni fyri Javnaðarflokkin í februar uttan at taka seg aftur sum fakfelagsformaður. »Umboðar hann meg og mítt fak ella Javnaðarflokkin?«, spyr Brynhild Thomsen atfinnandi.

### Spurdi kollegarnar

Edvard í Skorðini Joensen sigur, at avgerðin varð tikin eftir drúgvar metingar, og at hann framvegis heldur fast um, at talan ikki var um nakra skeiva avgerð.

– Eg ráðførdi meg við mínar kollegar í grannalondunum kring okkum og við roynd fólk í fakinum, og eingin metti nakað skeivt vera við hesum, sigur Edvard í Skorðini Joensen. Hann vísir á, at tað er fulli rætturin hjá einum og hvørjum borgara at stilla upp, og at hann ikki fær eyga á nakra negativa avleiðing orsakað av síni avgerð, hóast hann er fakfelagsformaður.

– At eg sum valevni ikki kann røkja mín sess sum fakfelagsformaður á fullgóðan hátt, er ikki rætt, heldur formaður Blaðmannafelagsins.

### Eingi mótmæli

Spurdur, um hann ikki skilir, at fólk kunnu seta spurnartekin við tvinnu leiklutir hansara, sum Brynhild Thomsen gjørdi í gjár, og at hetta í sær sjálvum ikki er nóg mikið at takka nei til politikk, er hann greiður.

– Trupulleikin við ymsum funktiónum sleppa vit ongantíð undan, og so kunnu vit tað sama vera ivandi um alt, heldur fakfelagsleiðarin. Sambært honum vilja líknandi støður altíð taka seg upp, og um trúvirðið verður skaðað av ymsum virksemi, sum einki hevur við hvørt annað at gera, kunnu vit tað sama grava okkum niður og ikki luttaka í nøkrum.

– Sjálvandi kann onkur kanska hava hug at seta spurnartekin, og tað er keðiligt, men fyri mítt viðkomandi haldi eg ikki, at støðan sum valevni ávirkar trúvirðið í formanssessin í Blaðmannafelagnum, og eg havi heldur einki merkt til hetta, vísir Edvard á.

Í hesum sambandi vísir hann fyrst á aðalfund, Blaðmannafelagið hevði fyri stuttum, og ikki eingin mótmælti ella vísti á, at Edvard ikki hevur borið seg rætt at, og at trúvirðið hansara er sett í vanda orsakað av politiska leiklutinum.

– Eg var afturvaldur, og eingin gretti orð, so tað kann ikki vera so ringt, slær Edvard fast. Sambært honum hevði hann als ikki tikið av sum valevni Javnaðarfloksins, um hann á nakran hátt hevði merkt til trupulleikar av avgerðini, men tað hevur hann ikki gjørt.

– Umframt tað vistu tey flestu frammanundan, hvørja politiska áskoðan eg havi, og eg havi ongantíð dult fyri hesum. At eg so eri valevni fyri sama flokk kann ikki skaða, sigur ein avgjørdur Edvard í Skorðini Joensen.

# – Karmar skaptir fyri pressufrælsi

**– Eg skilji væl, at trúvirðið verður sett í vanda, tá bæði Dimmalætting og hini bløðini eru tengd at politikki, sigur Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmu. Hann undirstrikar tó, at við støði í einum almannkunngjørdum skjali um túsundáraskiftið verður hvønn dag stremba eftir fullfíggjaðum objektiviteti uttan mun til, hvat og hvør verður viðgjørdur**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Hóast lesarin kann freistast at spyrja um trúvirðið, er fyri okkara viðkomandi eingin orsøk til hetta, tí vit hava skapt karmar fyri reinum objektiviteti, og hetta er idealið allan vegin, slær blaðstjórin á Dimmalætting, Ingi Samuelsen fast*

Í seinastu útgávu varð ljós við tveimum greinum kastað á trúvirðið í føroyska fjølmiðlaheiminum, har serliga leiðslu- og ognarviðurskiftini kring miðlarnar vórðu tikin upp.

Blaðstjóri á Dimmalætting, Ingi Samuelsen, er fullgreiður um trupulleikan við partapolitiska tilknýtinum handan tíðindabløðini, men Dimmalætting orðaði um túsundáraskiftið eitt skjal við samtykt frá nevnd og eigarum, sum skal tryggja óheftni og objektivitet, og sum sambært blaðstjóranum skapar allar fortreytir fyri trúvirði.

– Drúgva gongdin við skjalinum var ein stórur sigur fyri pressufrælsið á Dimmu, og um tíðindafólk okkara á nakran hátt merkja trýst frá nøkrum, kunnu tey altíð vísa til skjalið, greiðir Ingi Samuelsen frá.

Hann heldur, at við hesum er ein trygd veitt lesaranum, og hóast eingin kann vísa aftur, at politiskt litaðir persónar eru partur av ognarviðurskiftunum kring Dimmu, er sambært Inga ikki neyðugt hjá lesaranum at hava bakhugsanir.

### Leiðslan onga ávirkan

Blaðstjórin á Dimmalætting sigur, at hann ongantíð hevur upplivað, at leiðslan hevur ávirkað tíðindaflutningin, og dagliga arbeiðið verður tí ikki ávirkað av, at virknir limir í Sambandsflokkinum eru partaeigarar á blaðnum.

– Lat meg siga tað soleiðis, at tað kann vera ein trupulleiki fyri trúvirðið, men tað átti tað ikki at verið, tí dagliga arbeiðið á Dimmu strembar eftir fullfíggjaðum objektiviteti, sigur Ingi Samuelsen.

Spurdur, um tað yvirhøvur er gjørligt at hava fullfíggjað eftirlit við tínum egna arbeiðsgevara, og um Dimmalætting t.d. hevði avdúkað eina sambandsgølu, er blaðstjórin greiður.

– Tað er okkara mál, og tað er tað, vit stremba eftir við støði í skjalinum, og vit gera tað, vit kunnu, fyri at varðveita trúvirðið, greiðir Ingi frá. Hann leggur afturat, at júst tá mál um Sambandsflokkin verða viðgjørd, eru teir á Dimmu serliga varnir, so eingin møguleiki verður hjá lesaranum at ákæra blaðið fyri at framleiða subjektivan og partapolitiskan tíðindaflutning. Hann spyr, hvussu ofta eg síggi Lisbeth L. Petersen í Dimmu samanborið við, hvussu ofta løgmaður er at síggja í Sosialinum.

### Persónar framum politikarar

Ingi Samuelsen vísir víðari á, at tað eru persónar og ikki politikarar, sum sita í blaðnevndunum, og at tingini á henda hátt ikki verða blandaði saman.

– Hóast lesarin kann freistast at spyrja um trúvirðið, er fyri okkara viðkomandi eingin orsøk til hetta, tí vit hava skapt karmar fyri reinum objektiviteti, og hetta er idealið allan vegin, slær blaðstjórin á Dimmalætting, Ingi Samuelsen fast.